## Heðin fyribils landsliðsvenjari

Fótbóltssambandið hevur heitt á Heðin Askham um at vera venjari hjá fótbóltslandsliðnum, sum skal til Íslands at spæla vinardyst 22. mars. Tað visti 3-2 at siga í gjárkvøldið. Saman við Jens Martini Knudsen, sum er hjálparvenjari, skal hann taka liðið út til vinar- og grannadystin. – Hetta er ein spennandi uppgáva, sum eg taki í fullum álvara, sigur Heðin Askham, sum fyrst og fremst fer at lata spælarar úr føroysku kappingini manna liðið.



## Ike neyvan nakran sáttmála í 07 Vestur

Um vikuskiftið skrivaði Portalurin, at fleiri nýggj nøvn vóru í hópinum hjá 07 Vestur, sum nú av álvara er farið undir fyrireikingarnar til komandi kappingarárið. Ein teirra var Ikechukwu Onyema – vanliga róptur Ike – sum áður hevur roynt seg í NSÍ og AB. Hann hevur ikki júst tey evnini, felagið sóknast eftir, og tí verður nigerianski framherjin neyvan partur av hópinum hjá 07 Vestur í 2009, skrivar heimasíðan soccerandequipment.com.




*Rúni Seloy og Bjørk Herup Olsen við sínum heiðursmerkjum frá DM-kappingini um vikuskiftið*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

# Nokk so kul at vinna DM

**15 ára gamli Rúni Seloy og 17 ára gamla Bjørk Herup Olsen gjørdust um vikuskiftið danskir meistarar í innandura renning. Hóast sín unga aldur, hava tey runnið í fleiri ár, og fáur man ivast í, at nøvn teirra fara vit at hoyra aftur og aftur í sambandi við kapprenning mong ár inn í framtíðina**

MEISTARAPRÁT
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Seinnapartin í gjár setti Sosialurin teimum báðum nýggju, føroysku danmarksmeistarunum í innandura renning, sum vit fingu um vikuskiftið, stevnu á Tórsbreyt, har tey frammanundan hava sína dagligu gongd ella – kanska rættari – dagligu renning…

15 ára gamli Rúni Seloy og 17 ára gamla Bjørk Herup Olsen megnaðu at vinna sær hvør sítt gullmerki í kappingini um donsku meistaraheitini í innandura kapprenning. Haraftrat fingu tey hvør sítt heiðursmerki aftrat, Bjørk eitt silvurmerki og Rúni eitt bronsumerki, og haraftrat setti Bjørk føroyskt met, tá hon vann silvur.

Bæði tvey viðganga, at »tað er nokk so kul« at vera danskur meistari, og tað er heldur ikki torført at skilja, tá tey stilla upp til myndatøku við hvør sínum tveimum heiðursmerkjum, sum tey fegin vísa fram.

Hóast tað regnar og er kalt og illfýsið, kemur ein lítil skái í veðrinum, so myndin kann verða tikin, og so er annars klárt til prátið við tey bæði, sum – hóast sín unga aldur – longu vita væl, hvat tað merkir at røkka sínum málum og alla tíðina at seta sær nýggj mál.

### Nógvir áskoðarar

Fyrst venda vit aftur til leygardagin og sunnudagin, tá tey saman við fýra øðrum føroyingum vóru í danska býnum Skive, har ein stór høll við rennibreyt var karmur um kappingina.

– Umstøðurnar vóru heilt ótrúliga góðar og tað var ordiliga stuttligt at kappast har. Fult av fólki var og hugdi, og tey heppaðu okkum, meðan vit runnu, greiðir Bjørk brosandi frá.

– Vit hoyra øll til donsk feløg, tá vit eru niðri og kappast, so tey frá »okkara feløgum« kenna okkum og stuðla okkum, tá vit kappast. Og so er tað sjálvandi eisini sera stuttligt, tá tað eydnast at fáa góðar tíðir og at vinna. Tað er tað allarstuttligasta.

Eisini Rúna dámar væl at kappast innandura, men hann sigur, at tað er nokk so nógv øðrvísi enn at kappast uttandura, tí breytin ikki er upp á akkurát sama máta.

– Tú mást leggja tær renningina betur til rættis, tá tú skalt yvirhála, tí langsíðurnar eru so stuttar, sigur hann.

Og at yvirhála duga tey bæði tvey, tí tað siga jú úrslitini alt um.

### Seks heiðursmerki

Rúni vann leygardagin gull á 800 metra teininum, og hóast talan sjálvandi var um harða kapping, nú allir teir bestu rennararnir í ymsu aldursbólkunum vóru við.

– Eg hevði væntað eitt nokk so gott úrslit á 800 metrum, men hinvegin visti eg, at eg fór at verða pressaður sunnudagin, tí har var ein danskari við, so er nokk so góður á 1.500 og 3.000 metrum. Men eg fekk so silvur, sigur hann.

Bjørk rann 3.000 metra

**Føroysku úrslitini í DM-kappingini**

| Nr. Navn | Teinur | Bólkur | Tíð |
|---|---|---|---|
| 1. Bjørk Herup Olsen | 1.500 m | gentur 18-19 ár | 04.28,27 min. |
| 1. Rúni Seloy 800 m | dreingir | 14-15 ár | 02.06,68 min. |
| 2. Bjørk Herup Olsen | 3.000 m | gentur 18-19 ár | 10.16,93 min. |
| 2. Rebekka Fuglø | 800 m | gentur 16-17 ár | 02.24,48 min. |
| 3. Rúni Seloy 1.500 m | dreingir | 14-15 ár | 04.22,57 min. |
| 3. Jóan Karl Joensen | 1.500 m | menn 20-22 ár | 04.15,85 min. |
| 4. Rebekka Fuglø | 400 m | gentur 16-17 ár | 00.63,19 sek. |
| 5. Jóan Karl Joensen | 800 m | menn 20-22 ár | 02.03,88 min. |
| 7. Jan Elmar Sørensen | 3.000 m | dreingir 18-19 ár | 09.40,77 min. |
| 10. Guttorm Sørensen | 3.000 m | menn | 09.23,81 min. |
| 10. Jan Elmar Sørensen | 1.500 m | dreingir 18-19 ár | 04.25,99 min. |
| 12. Rebekka Fuglø | 200 m | gentur 16-17 ár | 00.28,72 sek. |